# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Inger Jensen 60 ár



*Inger og ommusonurin, Jákup*

Mikudagin 27. mai fyllir Inger Jensen í Havn 60 ár. Inger er úr Havn, dóttir Anne Elise og Meinhardt Arge. Hon er gift við Jens Petur Jensen, sum er ættaður úr Fuglafirði.

Inger arbeiddi sum sjúkrahjálpari í Danmark og á Landssjúkrahúsinum, áðrenn hon í 1980 byrjaði sum sjálvstøðug og leigaði seg inn í SMS, ið júst tá varð útbygt við øðrum byggistigi. Hon hevði fyrsta handilin har við barnaklæðum, Pinkan, og eitt ár seinni læt hon upp ein handil afturat sum fekk navnið Fípan, sum var ein handil við barnaútgerð og klæðum til pinkubørn. Hetta vóru nøkur sera spennandi ár hjá henni, sum hon treivst væl við. Men tá hon í 1985 fekk ein son, ein eftirnølara, valdu hon og maðurin, Jens Petur, at selja handlarnar í SMS.

Hon var so heimagangandi til 1997, samstundis sum hon eisini tók HF-prógv. Í 1997 keyptu Inger og Jens Petur ognirnar hjá Jóan Jakku í Vágsbotni, og hevði Inger handil har til 2002, tá hon gavst vegna vánalig heilsu.

Stóri frítíðaráhugin hjá Inger er havin, har hon brúkar nógv av síni tíð. Hon bindur eisini fyri Guðrun & Guðrun, og um summarið hevur hon Ból & Bita, har hon kemur í samband við nógv ymisk fremmandafólk.

Børnini eru fýra: Heðin, Anna Katrina, Malan og Meinhard. Barnabørnini er seks í tali.

Dagin heldur Inger heima í Skotarók leygardagin 30. mai frá kl. 11 til 15.

*-red*

## Eilif Samuelsen 75 ár



Fríggjadagin 22. mai fylti Eilif Samuelsen í Havn 75 ár.

Eilif var føddur í Fuglafirði, men hevur meginpartin av lívinum búð í Havn. Foreldrini vóru Rakul Malena Midjord og Steingrím Samuelsen, sum bæði vóru úr Fuglafirði.

Borgarliga arbeiðið hjá Eilifi hevur verið lærari, men úti um landið man hann vera mest kendur sum politikkari. Hann tók læraraprógv í Haslev í 1958 og var so í Fuglafirði, í Hvalvík, Tórshavnar Kommunuskúla og á Venjingarskúlanum. Eisini hevði hann tímar á Læraraskúlanum.

Eilif var á árskeiði á Danmarks Lærerhøjskole 1968-69 í donskum máli og bókmentum. Hann var formaður í Lærarafelagnum í 12 ár frá 1968, blaðstjóri á Skúlablaðnum 1947-81, limur í Landsskúlaráðnum 1992-94 og í Mentanargrunninum 1986-94. Hann hevur havt stóran áhuga fyri sangi og tónleiki og var dirigentur fyri Kristiliga Sangkórinum. Eisini var hann formaður í Tórshavnar Musikkskúla 1988-94.

Eilif var tingmaður fyri Sambandsflokkin í Suðurstreymoy 1978-90. Hann hevur eisini verið landsstýrismaður tvær ferðir: 1981-85 og 1994-98. Bæði skeiðini umsat hann skúlamál, og í seinna førinum var hann mest í andglettinum sum landsstýrismaður í kommunumálum.

Sum pensionistur er Eilif sera virkin. Hann hevur sítt egna forlag, Forlagið Hemlið, sum gevur út klassikararar í heimsbókmentunum á føroyskum. Í 2004 gav hann út “Játtanir Augustinusar”, sum er ein av teimum mest týðandi og mest nýskapandi verkunum í latínskum bókmentum. Í 2005 gav hann út bókina “Fedrar og synir” eftir Ivan Sergejevitj Turgenjev, og 2008 gav hann út bøkurnar “Barrabas” og “Bøðilin” eftir Pär Lagerkvist.

Eilif er giftur við Katrini Hansen úr Saksun. Tey eiga børnini Sigrun og Jákup.

*red*

## Bygningssnikkarar fingið prógv



Mánadagin 25. mai fingu tríggir bygningssnikkarar prógv á Tekniska Skúlanum í Tórshavn.

**Teir eru f.v.:** Eyðfríð Kristiansen, Sandavágur, John Dávur S. Djurhuus, Tórshavn, og Sveinur Gaard Olsen, Tórshavn.

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Dagurin**
**26. mai. Beda prestur**. Enskur munkur sum doyði í árinum 735. Eftirtíðin gav honum navnið Venerabilis, hin tignarligi. Hesin enski munkurin gjørdist ein hin mest metti kirkjulærarin í miðøld við átrúnarligu, søguligu og málsligu bókum sínum. Líka í Føroyum hava teir tikið til Beda og lærdóm hansara.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hanna Lisberg, Tórshavn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin, 82 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Dómskirkjuni týsdagin kl. 13.

Kistan við **Erland Stenberg** fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi týsdagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Sumbiar kirkju mikudagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Erland, kunnu lata Missiónshúsinum í Sumba eina peningagávu, konta í peningastovnunum.

